# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kenna enn hitan frá heilsu-hjálparum



*Ása Olsen handar fyrsta heimahjálparanum, Thomasiu Matras eitt av fyrstu eintøkunum av bókini.*
*Mynd: Jan Müller*

Mikukvøldið í farnu viku var bókin “Hendur, ið fjálga” løgd fram fyri fullsettari høll í Miðlahúsinum.

Hetta er bók sum Ása Olsen hevur skrivað, og sum lýsir arbeiðið og søguna hjá føroysku heimahjálpunum og heilsuhjálparunum.

- Mong eru tey, sum hava kent hitan av teimum hondum, ið gjøgnum hetta arbeiði hava verið við til at veita linna, har ein ikki rakk til sjálvur, skrivar rithøvundurin í fororðinum.

Í bókini eru persónligir upplýsingar frá heimahjálparum og heilsuhjálparum, og er hetta gjørt fyri at heiðra allar hesar sum hava veitt hjálp, har tørvur var á tí.

Søgan um Heimahjálparskipanina byrjaði í 1973, tá Anna Skæling varð sett sum leiðari fyri heimahjálparskipanina í Føroyum.

Fyrsti heimahjálparin, ið varð send til arbeiðis var Thomasia Matras. Hetta hendi 18. oktober hetta árið.

Síðani tá hava hundraðtals kvinnur og menn ferðast heim úr heimi og bygd úr bygd fyri at fremja týdningarmikla arbeiðið hjá heimahjálparunum.

Nógvar av hesum kvinnum hava verið fyrimyndir hjá teimum, sum komu aftaná. Alt hetta ber til at lesa meiri um í bókini sum telur um 180 síðu.

Eitt yvirlit yvir allar heimahjálpir finst eisini í bókini.

**sb.**

*Tær sum skrivaðu søgu – og hvørs søga nú er komin út í bók – Anna Skæling (vinstrumegin) heilsar uppá Thomasiu Matras*
*Mynd: Jan Müller*



**Hotel Øravík til sølu**

FØROYABANKI

Væl rikið gistingarhús í Øravík til sølu.

Stórir vakstrarmøguleikar eru í fyritøkuni, sum hevur havt gott rakstraravlop seinnu árini.

Nærri upplýsingar fáast við at venda sær til:

**Føroya Banki**
Corporate Finance
Húsagøta 3
100 Tórshavn
Tlf. 330 330

**www.foroya.fo**

Vit sóknast eftir dugnaligum

**Timburmanni/ Snikkara**

**ella fólki við royndum í fakinum**
at byrja skjótast gjørligt!

Ring og hoyr meira
á tel 56 56 00
ella send ein T-post til viking@viking.fo

VIKING SMÍÐ
**Bóndaheygur 9**
**FO-100 Tórshavn**

TEAMBS